Meðan vit royna tað vit eru mentir

ST-boðskapur til ungdómin

Aðalskrivari Sameindu Tjóða, Kurt Waldheim, hevur sent ungdóminum um allan heim ein boðskap, har hann m. a. tekur soleiðis til:

Meðan vit Sameindu Tjóða felagsskapinum, royna tað, vit eru mentir at loysa allar teir truplu spurningar, ið framvegis plága og tyngja lond og fólk, royna vit samstundis at leggja stoðið undir ein betri heim, har ung frá í dag og í morgin vilja hava líkindi at vaksa og mennast í frælsi og sóma.

»At bjarga komandi ættarliðum undan krígsins ræðslu ... at játta trúnna á menniskjarættindum ... at skapa umstøður, har rættvísi og spekt kunnu trívast ... at fremja sosialan framburð og hægri livikor ...« hetta eru eftir ST-sáttmálanum veruligu orsøkirnar til, at Sameinda Tjóða felagsskapurin virkar.

Í meiri enn fjórðingsøld hevur ST verið miðdepulin fyri felags alheimsroyndir at skapa eitt menniskjansligt sam felag, svarandi til, hvat ið tey, ið liva á hesi jørð kunnu krevja. Enn er minni enn so rokkið á mál, ella vælferð tryggjað øllum, men eg hugsi kortini, vit eru komnir so langt, at tað loyvir heimsins ungdómi at taka lut í bardaganum at vinna á teimum trupulleikum, ið forða rættferð og vælferð.

Framhald á 5. síðu. (1)

Bønir til Sosialin

Vegna troling á landleiðini

Hvat meina nú hesir góðu høgtæraðu løgtingsmenn, ið nú sita og teir, ið ikki komu innaftur. Teir viðtóku byggjan av flakavirkjum bæði her og har og løgdu alt væl til rættis fyri, at virkini kundu koma. Alla tøkk at bera teimum fyri tað; men nú tá sumrini eru ring at koma ígjøgnum hjá hesum virkjum vegna ráevni, og ein kjansur var at fingið teimum arbeiði við at víst til troling á ávísum leiðum, taka teir bara støðu viðvíkjandi sínum egna lumma og stemmu síggjandi at koma innaftur næstu ferð og sabotera bæði arbeiði og drift, — hetta eru menn.

Ójavnir eru menn á máli um hesa drift, men synd er í Føroyingum, nú tann danska verjan er vorðin so, at hon tekur føroyskar bátar fram um at røkja fiskimarkið ¼ fjórðing innan fyri 12, tí tað vísir seg, at tann danska verjan liggur frá 6 til 8 fjórðingar og tekur føroyskar bátar, og eingilskmenn dansa eitt sindur innanfyri og sjálvsagt flenna at hesum innanríkisviðurskiftum. Lættari er hjá teimum at koma innum, tá sjóverjan er so stutt frá landi.

Eg havi havt við 5 bátar at gera tey seinastu 6 árini, og hava teir á línu ikki fingið so mikið sum 100 pund tilsamans allir, av tí danska hotellmatinum, sum kallast reyðsprøka og tunga, so tá hon kann fáast í troli, kann hetta ikki vera skeivt at taka hana.

Men tá ið løgtingsmenn, sum bara siga nei vegna sína stemmu, og ikki samráðast við fiskirannsóknarstovuna, sum í fjør ikki meinti at hetta var skeivt, má hetta sigast vera ómansligt, nú ið bátarnir hava skaffað sær hesar dýru greiðir.

Bert spell at hesir menn hava frí til Ólavsøku, men teir fáa nokk løn, so teir kunnu sita og teinkja um hetta til hesa tíð, møguliga kemur samvitskan at sláa teir vegna líkvitetin hjá flakavirkjunum, ið teir sjálvir hava verið við til at fáa her á landi.

Eg vóni ikki, at teir ynskja, at allir trolbátarnir skulu enda konkurs í landskassanum.

Tað er mín vón, at tá teir einaferð fara til arbeiðis aftur fara at gera nakað við hetta.

Trolmaður.

* * *

Harra blaðstjóri hýs mær hesum reglum:

Tað er nærmast stuttligt at hoyra hesar góðu menn úr tjóðveldisflokkinum, eitt nú lærarar, læknar, háskúlastjórar og allar teir úr hægru lønarflokkunum í talu og skrift siga og skriva teir, hvussu gott alt verður í Føroyum, tá loyst verður frá Danmark.

Men alt Føroya fólk veit, hvussu nógvar miljónir vit fáa um árið úr Danmark, og hvør skal so gjalda allar hesar milj., sum vit ikki fáa úr Danmark, tá loyst verður. Verða tað teir hægru lønarflokkarnir ella teir minnimentu í samfelagnum? tað verður allarhelst teir seinnu.

Uppundir seinasta løgtingsval segði ein prestur, sum var valevni hjá tjóðveldisflokkinum, at vit kundu gott klára okkum sjálvar, men harafturímóti segið hann onki um, hvør skal gjalda hina helvtina av prestalønini, sum verður goldin beinleiðis úr danska statskassanum, og soleiðis er við øllum hinum hægru lønarflokkunum hjá tjóðveldismonnum.

Nei tjóðveldisprestar, tjóðveldislærarar, tjóðveldissakførarar tjóðveldislæknar, tit skulu fylkjast við tykkara arbeiðskammirátum í Danmark, meðan fiskimenn og verkamenn tit mugu og skulu haldast uttanfyri. Tit skulu gerast trælir hjá stórkapitalinum.

At hendan hugsan hevur rátt leingi í tjóðveldisflokkinum er øllum greitt, vit kunnu bert minnast aftur á fiskimannaverkfallið, sum var fyrst í 50'unum, tá slitmannafjøldin í Føroyum stóð í boði at fáa millum sjey- og áttahundrað kr. í verkfalshjálp, men hvat søgdu slitmannavinirnir, tjóðveldisleiðslan í FF tá, jú teir søgdu, at hetta mátti ikki henda. Ein teirra, sum lá á Landssjúkrahúsinum tá hetta hendi, breyt seg upp úr songini fyri at sleppa á fund at forða fyri hesari peningahjálpini, sum kom úr Danmark.

Við stjórnarræðnum í Føroyum tá sótu sambands- og fólkafloksmenn; hetta sambandsstýrið kom heldur ikki okkara slitmannafjøld til hjálpar.

Og so til seinast, fiski- og verkamenn úr fólkaflokkinum, sambandsflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og úr framburðsflokkinum, hvussu leingi ætla tit at láta tykkum villeiða av hesum flokkum, sum siga seg vera borgarligir, liberalir. Teir kunnu aldrin í verðini hava áhuga fyri fiski- og verkamonnum, tað er øllum Føroya fólki greitt.

Javnaðarflokkurin hevur í roynd og veru víst, at hann hevur bøtt um korini hjá tí minna manninum, tí vil eg biðja alla ta føroysku slitmannafjøldina fylkjast um henda flokk — Føroya Javnaðarflokkur.

Javnaðarmaður.

Tigandi veingirnir

eftir W. E. JOHNS

II. PARTUR

«Tann góði, gamli mátin við at royna seg fram fer brátt at vísa okkum, um vit mistaka okkum ella ikki.«

»Um svarið er »dúgvur«, sig mær so, hvussu tær kunnu flytast inn í landið, tí so má talan vera um regluligan innflutning.«

»Kann tað vera mær loyvt at skjóta upp, at vit flyta okkum eitt fet í senn? Vit kunnu tosa um hin spurningin, tá vit hava fingið prógv fyri, at teir veruliga nýta dúgvur, annars er alt bara til onga nyttu.«

»Ger so væl,« segði eg heldur speiskliga, »sig mær so, hvussu vit kunnu fáa at vita um teir nýta brævdúgvur.«

»Tað skuldi ikki verið torført, »svaraði Vane hóvliga, »ein dúgva, sum flýgur higani frá og til Týsklands, noyðist at flúgva fram við eysturstrondini.«

»Sjálvandi«.

»Og tygum hava menn á varðhaldi fram við strondini at hyggja eftir flogførum. Hesir kundu so eisini hugt eftir brævdúgvum, um teir fingu boð um tað, tí dúgvur flúgva ikki hægri, enn tær sjálvar vilja.«

»Og um teir so sóu onkra brævdúgvu, hvussu skulu vit so fanga hana?«

»Vit hava ongan áhuga fyri sjálvum fuglinum — heldur eiga vit at finna fram til, hvaðan hon kemur.«

»Tað man fara at vera torført, tí um tað eydnast tínum monnum at síggja eina dúgvu á veg til Týskalands, so verður tað sera trupult at finna aftur á tann plettin, haðani hon lætti sær á flog.«

»Als ikki. Teir, sum hyggja eftir flogførum, eru eisini fyrir fyri at rokna tílíkt út, um teir bert síggja, hvørja kós dúgvan flýgur. Ein slík brævdúgva hevur bert eitt ynski: at koma heim hagar, sum hon kom frá, og hon velur stystu leiðina, sum er ein bein linja. Um vit tí hyggja eftir, hvussu henda linja peikar aftureftir, so vil henda linja vísa okkum, hvar á leið tann pletturin man vera, haðani dúgvan er komin frá.«

»Tygum hava rætt,« segði eg, »hatta havi eg als ikki hugsað um. Vit skulu hava eygunum eftir tí næstu dúgvuni.«

»Skuldu vit ikki heldur fingið vissu fyri, at tað veruliga er ein dúgva, ið talan er um?« skjeyt Vane upp. »Sig við menn tínar at hyggja væl eftir. Lat meg so vita av, tá frágreiðingarnar eru klárar, so kunnu vit fara undir annan tátt.«

Vane streyk hárið burtur frá vanganum við hondunum. Síðani setti hann sín gamla panamahatt á høvdið.

»Henda skamtanin, sum nú er av øllum, gongur hart út yvir matarlystin,« helt hann fyri og suffaði, »men um tygum vilja gera mær ein beina, so komi og fái tygum ein morgunmatarbita saman við mær.«

»Takk,« svaraði eg, »men tygum hava givið mær nóg mikið at gera og hugsa um fyribils.«

Tveir dagar seinni kl. 9 á morgni fekk eg ta fyrstu frágreiðingina um dúgvumálið.

Klokkan seks um morgunin høvdu menn sæð eina dúgvu flúgva fram við Essexstrondini beint vestureftir. Áðrenn eg fekk stundir at ringja til Vane, komu eini nýggj boð. Sami maður hevði sæð eina aðra dúgvu flúgva sama veg sum hin fyrra.

Teir høvdu peilað kósina, og eg skrivaði hana niður á blokk mín. Síðani ringdi eg beinan vegin til Vane, og hann var longu komin at hitta meg. Áðrenn hálvur tími var farin.

»Eg hugsi, at vit hava fingið okkurt at halda um her,« segði eg væl hýrdur.

Vane brosaði og fór at hyggja at kortinum hjá mær, har hann kundi síggja støðini, har dúgvan fór at flúgva yvir og møguliga seta seg. Tá hann hevði kannað kortið eina løtu setti hann fingurin á kortið beint norðan fyri London.

»Ja,« segði hann og hugdi at úrslitinum, »um ætlan okkara er rætt, og tað er mangt, ið bendir á, at so er, so fara vit at finna teir umboðsmenninar, sum geva figgindanum tilfar um okkara hernaðarligu tiltøk onkurstaðnis eftir hesari linjuni.«

»Einasta, sum vit nú hava at gera, er at finna fram til, hvussu teir fáa dúgvurnar til Onglands,« helt eg fyri.

»Tað haldi eg ikki,« segði Vane hóvliga, »okkara starv er at finna tann staðin, haðanai dúgvurnar fara úr landinum við tíðindunum. Tá vit hava funnið njósnarareiðirið, so manst tú fara at fáa svar upp á allar aðrar spurningar við.«

»Hvat fáa tygum burtur úr tí veruleika, at teir sóu tvær dúgvur?« spurdi eg.

»Tað sigur okkum, at teir eru væl útgjørdir við dúgvum — tað boðar eisini frá, at tilflutningurin er regluligur. Síðani, at tíðindi verða send í tveimum eintøkum. Tað man helst vera fyri at hava eitt eykaeintak, um annar fuglurin ikki skuldi komið fram.«

»Flogleiðin eftir landi er long,« segði eg, tá eg hevði hugað at strikuni, sum Vane hevði teknað á kortið — slakir 100 km.

(Framhald)